

Jórunn Maria, Alda og Vár,
vinnararnir av kappingini 2014.

## HVAT FÁI EG BURTURÚR?

Hetta er ein kapping, og tí eru eisini vinningar. Tey, ið skriva tríggjar teir bestu tekstirnar, fáa eitt spennandi uppihald Í august 2015 á norðurlendska háskúlanum á Biskops Arnö í Svøríki, har tey hava skriviskeið fyri ung úr øllum Norðurlondunum.

## VINNINGAR

### HETTA KANST TÚ VINNA:

1., 2. og 3. vinningur: Ferð til Svøríkis á norðurlendska háskúlan á Biskops Arnö á ungdómsskrivilegu í eina viku við 1250 kr. í lummapeningi.

4. og 5. vinningur: Árshald í Bókaklubbanum Ung í Bókadeild Føroya Lærarafelags.

Harafturat eitt úrval av teimum bestu tekstunum prentaðir í einum tekstasavni.

Vinningarnir verða handaðir á hátíðarhaldi á Býarbókasavninum *altjóða bókadagin* tann 23. apríl 2015.





## Skriva ein góðan tekst og vinn eina viku á rithøvundaskúla í Svøríki við 1250 kr í lummanum



Løtumynd frá høvundaskúlanum fyri ung á Biskops Arnö í 2014

### SEND INN:

við telduposti:
- **skrivikapping2015@skulin.fo**

**seinasta freist:**
- **2. mars**
- **kl. 8.00**

Vilt tú vita meira:
- hygg á www. snar.fo/skrivikapping2015

NÁM

Rithøvundafelag Føroya

norden
Norðurlandahúsið í Føroyum




# Skrivikapping fyri øll í 9. flokki í Føroyum



## HVAT SKAL EG SKRIVA?

Tú sleppur at skriva nærum hvat, tað skal vera, men *ikki longri enn* tríggjar A4-síður ella í mesta lagi:

7200 tekn (umframt glopp).

Kann fegin vera styttri.

Verðin er stór og full av upplivingum.
Hugflogið er enn størri!



## HVAT SKAL EG SKRIVA *UM*?

Tú kanst skriva akkurát tað, tú hevur hug til! Men fyri at hjálpa tær, hava vit funnið eitt felags evni, sum ikki er avmarkandi, men letur upp fyri møguleikum.

Lat hugin flúgva! Ongin kann forða honum!



## HVUSSU SKAL EG SKRIVA?

Tú kanst skriva, sum tú vilt, men vit vilja fegin hjálpa tær at koma í gongd, og hava biðið kendar føroyskar rithøvundar leggja tær lag á.

Onki er ov smátt og onki er ov stórt.
Alt er áhugavert, tað valdast, hvussu tú sært tað.

# TEKSTIRNIR

## ALLIR TEKSTIR KUNNU VERA VIÐ Í KAPPINGINI

Tú kanst lata tínar tankar í júst tey orð, tú hevur hug. Skriva....

- eina stuttsøgu
- eina yrking
- ein sangtekst
- eina hugleiðing
- ein sjónleik
- eitt bræv
- Tað kann vera veruleiki eins væl og
- nakað úr tínum egna hugflogi...





# FELAGSEVNI

## EVNIÐ ER:

# 9.41

Hvat sigur 9.41 tær?

Leitar tú upp á netinum, kann 9.41 vera:

- eitt stríput skjúrt
- ein hundahvølpur
- ein boksikampur millum gentlemenn
- ein gimsteinur
- eitt dansandi barn
- eitt herðnaðarflogfar
- ein ljóðbylgja
- ein tarvafikting
- ein arbeiðsfílur
- ...
- ...



Í 2015 er 9.41 nakað heilt serligt í Føroyum.

Hvørjum hevur *tú* hug at siga frá?





# KVEIKINGARDAGUR

## VIT HITTAST!

Tann 26. januar 2014 kunnu allir 9. flokkar tekna seg til ein spennandi kveikingardag í Norðurlandahúsinum.

Har sleppa tit at luttaka í skriviverksmiðjum hjá hesum føroysku høvundum:

Arnbjørn Dalsgarð
Oddfríður Marni Rasmussen
Petur Pólsson
Rakel Helmsdal

Longu nú kanst tú hyggja at filmsklippum við teimum inni á www.snar.fo/skrivikapping2015, har tey geva tær hug at skriva.

Tekningarskjal til kveikingardagin er at finna á www.snar.fo/skrivikapping2015.

Eftir kveikingardagin arbeiða tit hvør sær við einum teksti.

Tit kunnu skriva frá nú og líka fram til tann

2. mars kl. 8.00

Tá letur stevnan, sum tekur ímóti tekstunum, aftur.